# Íslendingar brúka Føroyar sum fyrimynd



*Íslendingar og føroyingar á skúlabonki í Jarðfeingi (fyrr. Oljufyrisitingini, blaðm.)*

**Umboð fyri íslendskar orkumyndugleikar væl nøgd við kunning um føroyska oljutilgongd**

ORKUMÁL
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Herfyri vóru fimm umboð fyri íslendskar orkumyndugleikar í Føroyum fyri at kunna seg um føroysku oljutilgongdina her serstakliga um, hvussu vit hava skipað loyvisumførini, og hvussu vit annars hava skipað okkum á teimum ymsu umráðunum, sum hava tilknýti til oljuleiting.

Í hesum sambandi varð seminar hildið fyri íslendsku gestunum, har umboð fyri nógvar ymsar tættir innan vinnu og almennar stovnar hildu fyrilestur. – Hetta var eitt sera væleydnað tiltak og vórðu íslendingar einki minni enn ovfarnir av, hvussu væl tað hevur verið skipað fyri í allari okkara oljutilgongd sigur Súsanna Sørensen, tíðindastjóri hjá Jarðfeingi (fyrr Oljufyrisitingini, blaðm.) Hon sigur, at íslendingarnir, sum sjálvir eru í ferð við at fyrireika fyrstu leitirunduna, róstu teimum mongu fólkunum, sum hava lagt lunnar undir føroysku oljutilgongdini tað veri seg í lógarsmíði og øðrum tættum í tilgongdini.

Súsanna Sørensen leggur aftrat, at eisini tey og umboð fyri ymsar føroyskar myndugleikar fingu nógv burtur úr teimum báðum døgunum tey vóru saman. – Vit fingu eitt sera gott og neyvt innlit í íslendska orkulóggávu og annars orkustøðu og orkutilgongd í íslendska samfelagnum sum heild. Heríumillum liberaliseringini, sum er farin fram har. Henda vitan hevur nógv at siga fyri okkum, sum eru í ferð við at gera eitt nú eina elveitingarlóggávu. Súsanna Sørensen sigur, at íslendska vitjanin hevur verið bæði íslendingum og okkum sjálvum til stórt gagn.



*Nógv kom burtur úr felags kunningini um føroysku oljutilgongdina og íslendsku orkustøðuna*